## VIÐMERKINGAR

# Stór vanærilig skomm: Tey veiku og óhjálpnu ongan góðan

**Sámal Petur í Grund**
*fyrrv. landsstýrismaður*



Ikki oftani komi eg soleiðis fyri, at sinnið kemur í kók. Men síðani sitandi samgonga tók við, er tað komið í so oftani fyri.

Tó so, ikki verri enn so, at eg havi klára at hildið agressiónirnar fyri meg sjálvan.

Hetta tí at eg ikki ætlaði at luttaka í politisku debattini. Havi hildið meg tjent mína værnapligt á hesum økið.

Mangan hevur staðið nógv á og nú gjørdist so ovboðið.

### Samgonguavtalan

Signalini frá sitandi samgongu vóru tey flestu so lovandi, at ein skuldi trú at land okkara var í góðum hondum.

Boðað bleiv frá, at nú skuldu pensionistarnir have eina veiting, sum líktist eini mánaðarløn hjá fleiri av landsmonnum okkara.

Hugsaði við mær sjálvum, at teir bætar sum framdir vóru meðan Sjálvstýrisflokkurin sat við almannamálum, bert vóru peanuts afturímóti tí sum nú koma skuldi.

Hóast kensluna av ikki at hava rokkið hesum monnum og politikki teirra til knýggja, so fegnaðist eg um, at støðan hjá pensionistum í samfelagi okkara, sum eg hevði fingið eitt ávíst innlit í, nú gekk mót nýggjum virðiligum tíðum.

Eg yvist í um eg nakrantíð havið verið so vónsvikin fyrr.

### Skerjingar og skattalætti

Dagtilhaldini mugu steingja og skipanin við útbering av døgurða heldur uppat.

Røktarheim boða frá, at fólk má sigast upp, tí pengingur ikki er tøkur.

At samsvar ikki er millum andstøðupolitikk og samgongupolitikk hjá Javnaðarflokkinum er ikki nakað nýtt fyribrigdi. Men hvat siga hinir báðir flokkarnir í samgongu?

Hvat sigur Fólkaflokkurin, sum saman við Tjóðveldisflokkinum og Sjálvstýrisflokkinum, var við til at hækka pensiónirnar og økja um játtanina til dagtilhaldini?

Ein stór vanærilig skomm er tað, sum tey eldru og óhjálpnu vera viðfarin nú Javnaðarflokkurin situr við almannamálum.

Sitandi samgonga hevur sett sær fyri, at skattalætti uppá 60 milliónir skal veitast árliga í samgonguskeiðnum. Altso 240 milliónir yvir 4 ár.

Hesin skattalættin kemur fyrst og fremst at merkjast hjá teimum sum í forvegin hava eina av teim hægru inntøkunum.

Ein hevur hug at spyrja - "hvat í himmalsins navni hugsa tit fyri tykkum?"

Skulu tey veiku í samfelagnum bera byrðarnar, nú vit eru í einum lákonjukturi?

### Tey eldru og óhjálpnu

Tá tað sansar at í samfelagnum, so er møguligt hjá okkum sum standa mitt í lívsyrki okkara, at seta tiltøk í verk av ymiskum slagi.

Vit kunnu repa seglini. Vit kunnu taka eitt eykatørn. Vit kunnu skaffa okkum eitt og annað nærum ókeypis til matna. Møguleikarnir eru fleiri.

Hesar møguleikar hava tey eldru í skerdan mun, men tey óhjálpnu hava slettis ikki hendan møguleikan.

Flestu av teimum mugu bara sita og hyggja stúrandi at, meðan politikararnir avgera lagnu teirra.

### Grátuligt

Tað er grátuligt at hyggja at og fylgja við hvussu pengingur landsins verður umsitin.

Tað er peningur í landinum til at útbyggja samfelagið við ferjum, tunnlum og vegagerð.

Tað er peningur í landinum til íløgur í rennibreytir, vallir og upp til fleiri ítróttarhallir.

Peningur er í landinum til skúlagerð.

Peningur er til at leingja flogvøllin.

Peningaríkiligheitin sýnist at vera so stór at nærum alt er møguligt.

Men tey sum ein skuldi trúð høvdu tikið sítt tørn og gjørt sína samfelagstænastu skulu bløða.

### Eldraøkið

Eitt røktarheim er í gerð í Norðurstreymoy. Kenni ikki talið á teim arbeiðsplássum sum skulu til fyri at tænastan kann vera hildin á einum sømuligum støði. Men alt skal fíggjast av tí almenna.

Røktarheimið í Runavík verður útbygt við 24 plássum. Arbeiðsplássini skulu fíggjast av tí almenna.

Eitt røktarheim hevur hingið í leysari luft, báðu megin eina ella aðra á í Suðuroynni. Høvuðsargumentið fyri at kroysta tað niður á eitt grundstykki í Vági, er øll almennu arbeiðsplássini sum tað skapar.

Helst havi eg í sinnisrørslu gloymt onkra bygging á eldraøkinum sum eisini krevur økta játtan úr almenna kassanum.

Samanlagt er talan um stórar upphæddir sum skulu játtast yvir sama almenna kassa.

### 2015

Er verunleikin virkuliga soleiðis, at sitandi samgonga, við beráddum huga, hevur valt at venda eygum sínum móti einum tíðarskeiði, sum liggur langt eftir at teirra skeið í landsstýrinum er runnið?

Og er grundin tann, at teir flýggja frá veruleikanum.

Tað nyttar lítið at hava visiónir um tíðina eftir at samgonguskeiðið er runnið, og so lata verunleikan og tíðina sum tit kunnu ávirka fara fram við tykkum.

Eitt er vist. Tey sum í dag eru veik og óhjálpin mettast ikki av visiónum um 2015!

### Alment / Kommunalt

Tað verður sagt, at kommunurnar ikki eru fyrireikaðar at taka yvir eldraøkið.

Men álvaratos. So ófyrireikaðar, at tær ikki høvdu klára hetta betur, eru kommunurnar væl ikki.

Klára tit ikki hetta betur, leggið so økið út til kommunurnar sum skjótast.

Vakni so við og gerið tykkum greitt, at vit skriva 2005 eftir Kristi føðing, og ikki 2015.

# Barberstólurin

**Helgi Abrahamsen**



Tey flestu munnu kenna filmin "Einaræðisharrin" hjá Charlie Chaplin. Hesin filmurin, sum varð til í 1940, lýsir á ein skemtiligan hátt fólkatølaran Hynkel (Hitler).

Ein tann kendasta og stuttligasta hendingin í filminum er tá Napaloni (einaræðisharrin úr Bacteria) er á vitjan hjá Hynkel. Ráðgevin Garbitsch leggur Hynkel eina við, at hann má syrgja fyri alla tíðina at sita hægri uppi enn Napaloni. Hetta skal hava stóran psykologiskan týdning, og geva eina mynd av, hvør av teimum er tann stóri leiðarin. Men Napaloni hevur helst fingið somu ráðini heimanífrá, og endin er, at báðir sita í hvør sínum barberstóli og kappast um, hvør kann pumpa stólin hægri upp ímóti loftinum, fyri at síggja niður á hin.

Eg kom at hugsa um hetta filmsbrotið, nú drotningin var á vitjan í Føroyum. Serliga tann eini politiski flokkurin her á landi, hevur altíð havt ilt við at góðtikið tann fólkatokka, sum tey kongaligu hava í føroyska fólkinum. Tí kendi formaðurin seg noyddan at pumpa "floksins barberstól" eitt vet longur upp ímóti loftinum, undir vitjanini. Hann mátti vísa fyri fólkinum, at hann og partamenn hansara, vóru minst líka stórir leiðarar sum hennara Hátign Drotningin. Teir máttu vísa, at teir ikki aftraðu seg við at mótmæla tí, sum drotningin segði, og at teir ikki føldu tað sum sína skyldu at møta upp til kongligar døgurðar o.s.fr. Helst skuldu teir vera so provokerandi og arrogantir sum til bar, fyri at vísa drotningini og fólkinum, at teir sótu minst líka høgt uppi sum hon.

Men barberstólurin hjá Hynkel hevði sínar avmarkingar. Tá hann var komin uppí fulla hædd, datt hann sum ein punkteráð ballón niðuraftur til lægsta punktið. Soleiðis má eisini sigast um drotningaátakið hjá Tjóðveldisflokkinum. Tað eydnaðist at fáa stólin eitt vet upp frá gólvinum eina lítla løtu, men skommin gjørdist fullkomin, tí stólurin misti flogið.

Sjálvsagt hevur Tjóðveldisflokkurin loyvi til at yvirmeta sín leiklut í føroyskum politikki, við at pumpa seg eitt vet upp frá gólvinum. Men tað er harmiligt, at ein flokkur sum sigur seg vilja "byggja land", vísir, meðan landið er fult av útlendskum fjølmiðlum, at í hvussu so er ikki allir føroyingar duga vanligan fólkaskikk. Og serliga harmilig gerst søgan, tá hugsað verður um, at endamálið var ikki annað enn tað hjá Hynkel í barberstólinum. (At mótarbeiða ræðsluni fyri at onkur skal koma inn í landið, sum hevur hægri tign, enn ein hevur sjálvur).

# Gjaldið fyri ein løgmann?

**Jenis av Rana**
*f. Miðflokkin*



**Skerjanir landsstýrisins av vælferðartænastum skuldast ikki versnandi fíggjarumstøður, men er ein ábyrgdarleys politisk raðfesting!**

Í dag stendur farandi ættarliðið fyri skotum, herfyri vóru ta tey nýføddu á føðideildini og tey sálarliga veiku, og boðað er frá at trygdin á arbeiðsplássunum stendur fyri næsta niðurskurðartørni.

Versnandi fíggjarvánir tykjast øll verða so rørandi samd um er orsøkin.

Men er hetta so?

Miðflokkurin metir at ábyrgdarfull raðfesting av virðum samfelagsins hevði forðað fyri at hesi veiku økini guldu prísin, men í landsstýrinum tykist eingin vera, sum kennir ábyrgd fyri hesum økjum. Har velur man tíverri eina øðrvísi raðfestan.

Tá Miðflokkurin legði eitt sosialt raðfest broytingaruppskot fram til skattalættauppskot landsstýrisins, vendu ráðandi flokkanir tummulin niðureftir. Hetta uppskotið, ið fakfeløgini høvdu evnað til, hevði, umframt at verða sosialt rættvísari, spart 14 mió. kr. Men landsstýrið raðfesti skattlætta til tey múgvandi framum.

Í dag høvdu hesar 14 mió. komið væl við at verja vælferðartænasturnar.

Meginpartin av várinum royndu andstøðuflokkar og aðrir ábyrgdarborgarar at forða fyri eina høpisleysari flytan av miðnámsskúlanum í Vági til Hovs, m.a. tí at hendan 100% óneyðuga flytanin lættliga fer at kosta eitt tveyciffra milliónatal. Hugsar tær tann stuðul hesar burturblakaðu milliónir ístaðin kunnu verða undir vælferðina?

Var Løgtingið til arbeiðis í hesum døgum, hevði Miðflokkurin lagt uppskot fram um aftur at broyta avgerðina um at flyta skúlan úr Vági, og at brúkt sparda peningin socialt rætt. Møguleikin býðst okkum tíverri ikki fyrrenn eftir Ólavsøku, men hervið er hugskotið farið til landsstýrið.

Bert knappir 2 mðr. eru farnir aftur um síðani samgongan, uttan at blúgvast, samtykti at játta nøkrum útvaldum 2 mió. árliga í stuðuli í 3 fylgjandi ár. Eins lætt tað var at finna grundgevingar fyri hesum stuðli, ætti at verið at funnið grundgevingar fyri at byggja garð um vælferðina hjá tí ættarliðinum, sum løgdu lunnar undir ta vælferðarsamfelagið, sum dagsins politikkarar hava sum forrætt at umsita.

At siga at versnandi fíggjarvánir eru orsøk til syrgiligu aktuellu sparingar á veiku samfelagsøkjunum er ikki rætt. Skeiv og manglandi raðfesting er høvuðsorsøkin!

Óskiljandi at hetta hendir, meðan flokkurin, sum áður vardi tey veiku, situr við leiðslu landsins. Er hetta prísurin fyri at fáa løgmansheitið, so má sannast at hann gjørdist vanliga føroyinginum dýrur.

Minnist eingin farnar dagar og grundleggjandi hugsjónir?

Sova øll?